# Norrøna tekur táttin upp aftur

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Seinnapartin nakað minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og møguliga regn eitt skifti. Seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið ella storm av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 4 og 8 stig.

### Eftir ein langan steðg frá teimum víðagitnu ungdómstúrunum hjá Norrønu, tekur Smyril Line táttin upp aftur




Øll minnast allarhelst teir buldrutu ungdómstúrarar hjá Norrønu fyri fáum árum síðani, har nærum alt landið var á gosið, tí ungdómurin ikki skikkaði sær serstakliga væl umborð. Konseptið varð tikið av skránni, men nú tykist, sum ætlar Smyril Line at taka tað upp aftur.

- Vit ætla ikki at lata allan ungdóm í Føroyum svíða fyri, at onkur einkultir persónar ikki skikkaðu sær væl tá, sigur Jákup Sverri Kass, marknaðarleiðari í Smyril Line.

### Økt um trygdina

Ivasamt er, hvat gekk galið seinasta ungdómstúr, og hví hetta konsepti ikki bar til, men í øllum førum ætlar Smyril Line at økja um trygdina hesu ferð.

- Vit hava tikið tey neyðugu atlitini, og fara millum annað at økja um talið av vaktum umborð, umframt at vit ikki selja eins nógvir ferðaseðlar, sigur Jákup Sverri.

### Tónleikurin í hásæti

Smyril Line hevur lagt seg eftir at tónleikurin skal verða høvuðsattraktiónin á ungdómstúrinum. Tónleikaliga hevur rákið seinastu tíðina førka seg nærri at dj- og techno tónleiki, og hendan sjangran er væl umboðað umborð á Norrønu.

Dj'arnir eru fleiri í talið, og millum teirra verða vælumtóktu Dj Crapman og Dj Svendelboe. LIVE tónleikur verður eisini á skránni, og tað verða teir vælumtóktu føroyski sangararnir Finnur Jensen, Eyðun Nolsøe og Tróndur Enni, sum fara at framføra.

### Glitnir við umborð

Glitnir í Havn er serstakliga væl kent fyri eitt – fyrsta kareoke barr í Føroyum. Rákið í høvuðsstaðnum seinastu tíðina hevur verið, at fríggjakvøld gongur leiðin til Glitnir at syngja kareoke. Hesum hava Smyril Line eftir øllum at døma varnast, tí Glitnir og kareoke verða eisini við á ungdómstúrinum 6. apríl.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -12 |
| Qaqortoq | -8 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | -1 |
| Helsinki | -9 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | -2 |
| Warzawa | -3 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 11 |
| Malta | 9 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | -1 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 33 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1033 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga eystureftir og ein hátrýstryggur til Íslands kemur inn yvir Føroyar.



**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið fer móti Íslanldi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/02 kl. 06[00] – 19/02 06[00]. Hitin í gjár: 8,2°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° - Mesti hiti máldur í februar: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 17/02 kl. 06[00] – 18/02 06[00].
Avfallið higartil í februar: 88 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

16.februar — Seinna kvarter
19.februar — Mánin longst frá jørðini
25.februar — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. feb. | 2:35 | 15:00 | 1:35 | 14:00 | 1:50 | 14:15 | 4:35 | 17:00 | 5:35 | 18:00 | 0:50 | 13:15 | - | 12:15 | 2:50 | 15:15 | 3:50 | 16:15 | 2:20 | 14:45 | 3:35 | 16:00 |
| 20. feb. | 3:22 | 15:45 | 2:22 | 14:45 | 2:37 | 15:00 | 5:22 | 17:45 | 6:22 | 18:45 | 1:37 | 14:00 | 0:37 | 13:00 | 3:37 | 16:00 | 4:37 | 17:00 | 3:07 | 15:30 | 4:22 | 16:45 |
| 21. feb. | 4:07 | 16:29 | 3:07 | 15:29 | 3:22 | 15:44 | 6:07 | 18:29 | 7:07 | 19:29 | 2:22 | 14:44 | 1:22 | 13:44 | 4:22 | 16:44 | 5:22 | 17:44 | 3:52 | 16:14 | 5:07 | 17:29 |
| 22. feb. | 4:50 | 17:11 | 3:50 | 16:11 | 4:05 | 16:26 | 6:50 | 19:11 | 7:50 | 20:11 | 3:05 | 15:26 | 2:05 | 14:26 | 5:05 | 17:26 | 6:05 | 18:26 | 4:35 | 16:56 | 5:50 | 18:11 |
| 23. feb. | 5:31 | 17:52 | 4:31 | 16:52 | 4:46 | 17:07 | 7:31 | 19:52 | 8:31 | 20:52 | 3:46 | 16:07 | 2:46 | 15:07 | 5:46 | 18:07 | 6:46 | 19:07 | 5:16 | 17:37 | 6:31 | 18:52 |